# Jødadómur



# Jødadómur



- Jødar trúgva á ein Gud
- Gud gjørdi sáttmála við ættfaðir teirra, Ábraham
- Ábraham búði í Ur (í dag Irak)
- Rættvísur og gudrøkin maður, so rættur maður at heita á hjá Gudi
- Ábraham skuldi savna ættina og fara til eitt land, sum Gud vísti á
- Afturfyri skuldi Gud verja Ábraham og eftirkomarar hansara
- Gud ger sáttmála við Ábraham

# Móses

- Gud gevur Mósesi tey 10 boðini 500 ár eftir avtaluna við Ábraham
- Boðini greiða frá, hvussu tey skulu bera seg at móti Gudi og hvørjum øðrum
- Landið fer í tvíningar, tá ið Sálomon doyr




I
Tú mást ikki hava aðrar gudar
11
Tú mást ikki misbrúka navn Harrans, Guds tíns
111
Minst til at halda hvíludagin heilagan
IV
Æra faðir tín og móður tína
V
Tú mást ikki sláa í hel
VI
Tú mást ikki dríva hor
VII
Tú mást ikki stjala
VIII
Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum
IX
Tú mást ikki girnast hús næsta tíns
X
Tú mást ikki girnast konu næsta tíns, ikki húskall ella arbeiðiskonu hansara, ikki fæ hansara ella nakað, sum næsti tín eigur

# Tað lovaða landið

- Kánáanland
- Drúgv ferð
- Framgongd við trimum kongum
    - Sául
    - Dávid
    - Sálomon
- Landið í tvíningar
    - Ísrael
    - Júdæa (Jødi)
- Bíða eftir Messiasi



# Skriftirnar

- Tanak er heilaga bókin
- Tað, sum stendur í Gamla Testamenti, er eisini í Tanak
- Skrivað á hebraiskum
- Tanak er býtt í tríggjar partar:
- 1: partur er Torain (tær fimm Mósebøkurnar)
- 2. partur eru profetabøkurnar
- 3. partur eru Skriftirnar






# Tanak og Torain



Torain:

- Týdningarmiklasti parturin
- 613 forskriftir
- 248 boð (tal av beinum/limum í mannakroppinum)
- 365 forboð (dagar um árið)





# Trúargreinir

- Ortodoksir jødar: Royna at halda so nógvar av teimum 613 lógunum sum gjørligt. Menninir hava sítt skegg og krúllur hangandi niður við oyruni
- Konservativir jødar: halda ikki so fast við jødisk ritual og jødiskar siðir. Eru meira nútímans í lívførslu. Tó skulu dreingir verða umskornir.
- Reformertir jødar: halda færri ritual og siðir enn konservativir jødar. Vilja nútímansgera jødadómin. Brúka móðurmálið heldur enn hebraiskt
- Felags fyri allar er, at tey 10 boðini enn eru galdandi

# Jerúsalem





- Jerúsalem er heilagi býurin hjá jødunum
- Templið var staðið, har jødar hildu seg kunna tilbiðja Gud av heilum huga
- Sálomon kongur læt byggja fyrsta templið (960 f.Kr.)
- Bábylonar løgdu templið í oyði og tóku fólkið til fanga (586 f. Kr.)
- 70 ár vóru tey í útlegd, men bygdu templið uppaftur, tá ið tey komu aftur til Jerúsalem
- Jødar gera uppreistur móti rómverjum í seinastu øldini f. Kr. Jødarnir taptu, og rómverjar brendu templið niður
- Ortodoksir jødar biðja hvønn dag um, at templið verður bygt uppaftur
- Vesturmúrurin stendur eftir (eisini nevndur Grátimúrurin)
- Í dag stendur ein moska, har templið stóð

# Heim jødanna

- Allar siðvenjur verða førdar víðari í heiminum
- Trý ára gomul taka børnini lut í átrúnaðarligum siðum
- Tað verður fortalt, sungið og biðið heima
- Máltíðir, veitslur og høgtíðir verða fyriskipaðar
- Jødar læra eisini at æra foreldrini og eldri fólk, at hjálpa teimum, ið treingja, at vera gestablíð, at vitja sjúk, ikki slatra og tosa ilt um onnur



# Mezuzain

- Mezuzain er eitt lítið hylki, sum er við høvuðsdyrnar í hvørjum jødiskum heimi.
- Í hylkinum er ein pappírslepi við orðum úr Toraini:
- *Hoyr, Ísrael, Harrin, Guð vár, Harrin er einastur!*
- Orðini er bæði í morgun- og kvøldarbønini.
- Nomið verður við fingrasnippunum við hylkið, tá ið farið verður ígjøgnum dyrnar, og síðani verða fingrarnir mussaðir





# Sýnagogur

- Sýnagoga er samkomuhús jødanna
- Tær finnast í nógvum londum, har jødar hava sett búgv
- Bygningurin og innrættingin minna um templið í Jerúsalem
- Dávidsstjørnan er uttanfyri á nógvum sýnagogum
- ”Tann Heilaga Ørkin” er skáp ella lítið rúm, har skriftrullurnar verða goymdar
- Tvær talvur við teimum 10 boðunum skrivað á hebraiskum er í øllum sýnagogum
- Ein rabbini stendur fyri gudstænastuni
- Lisið verður hvørja ferð eitt petti úr Toraini og eisini partar av profetabókunum. Sungið verður úr Dávids sálmum







- Jødiskur hvíludagur. Byrjar við sólsetur fríggjadag og endar við sólsetur leygardag
- Allir hátíðardagar hjá jødum eru frá sólsetri til sólseturs
- Sabbatin verður fyrireikað fríggjadag
- Mamman tendrar minst 2 ljós og biður eina bøn
- Ljósini ímynda gleði og heilagleika

# Sabbat

# Høgtíðir





- Pesach er páskahátíðin, sum verður hildin um várið í sjey dagar
- Minnast, at Móses leiddi fólkið úr trældómi til Kánaanland
- Pesach merkir at ganga framvið (deyðseingilin)

# Shavout

- Jødiska hvítusunnan
- Sjey vikur eftir páskahátíðina
- Verður hildin til minnis um lóggávuna á Sinai fjalli , Toraina og sum tøkk fyri grøðina
- Sýnagogurnar verða pyntaðar við blómum
- Eta ofta mat við mjólkarúrdrátti til hesa høgtíð








# Purim

- Verður hildin um summarið til minnis um Ester drotning
- Børnini lata seg í føstulávintsklæðir hesa høgtíð
- Ester var gift við persiska konginum Áhasverus, men var sjálv jødi
- Ráðgevi kongs æt Háman, og øll skuldu falla á knø fyri honum
- Tað vildi fosturpápi Ester ikki, tí hann fall bert á knæ fyri Gudi
- Háman ætlaði tí, at allir jødar skuldu verða dripnir, men hesum fekk Ester tosað konginum frá



# Sukkot

- Verður tíðum kallað leyvsalshøgtíðin
- Høgtíðin varir í sjey dagar um heystið
- Tey byggja ofta smáttur úr leyvi, sum tey eta í hesar sjey dagarnar
- Hetta er ein áminning á, hvussu jødar búðu á heimferðini úr Egyptalandi





# Chanukah

- Ljósveitsla í desembur
- Verður hildin fyri at minnast endurvígsluna av templinum
- Varir í átta dagar
- Áttaarmaði stakin verður nýttur
- Hann verður tendraður til minnis um uppreistur ímóti grikkum, sum høvdu vanhalgað templið. Ein bólkur av jødum var innistongdur í templinum, og tey høvdu bert ein staka og bara olju til ein dag. Hóast hetta brann oljan í átta dagar

# Trúarjáttan

- Tað týdningarmesta í jødisku trúnni er, at tað er bert EIN Gud, sum ræður øllum
- Verður eisini nevnd Shemabønin (5. Mósebókin)





# Bøn

- Frá trý ára aldri verður væntað, at jødar hava Gud við í øllum
- Biðið kann verða innantanna, hart ella sungið
- Kvøldbønin skal biðjast í songini
- Áðrenn sabbatsmáltíðina og høgtíðir vælsigna foreldrini børnini.
- Genturnar verða vælsignaðar við teimum fýra mammunum (Sára, Rebekka, Rakul og Lea)
- Dreingirnir verða vælsignaðir við vælsignilsum, sum Jákup signaði sínar abbasynir við



# Tefillin

- Tvær smáar leðureskjur, sum ortodoksu menninir bera
- Tvey brot av Shemabønini eru skrivað á tvær pergamentrullur
- Onnur bundin um vinstra arm (høgra er mann vinstrahentur), og hon skal venda inn móti hjartanum. Hin er á pannuni



# Matur

- Kosher er jødiska orðið fyri nakað, ið er loyvt (t.d. at eta og drekka)
- Reglurnar fyri kosher standa í Toraini
- Tað eru serliga útlærdir slaktarar, ið slakta eftir forskriftunum í skriftini






# Føðing

- Dreingjabørn verða umskorin áttanda dagin
- Hetta staðfestir sáttmálan, sum Ábraham gjørdi við Gud, tá ið hann læt son sín, Ísak, umskera 8. dagin
- Er barnið genta, verður hon borin runt í sýnagoguni fyrsta sabbatsdag eftir føðingina. Pápin verður biðin at koma til ”heilagu ørkina” at siga, hvussu gentan skal eita





# Ung til vaksin

- Gentur verða hildnar at vera vaksnar, tá ið tær eru 12
- Dreingir, tá ið teir eru 13
- Nú skulu tey halda boðini í Toraini
- Dreingir halda Bar Mitzva, tá ið teir hava fingið frálæru í Toraini
- Gentur halda Bat Mitzva
- Tey svara spurningum frá rabbinaranum
- Stór veitsla





# Jødi

- Jødi er ein, sum er føddur av jødiskari mammu
- Til ber tó at konvertera, gongur tú til undirvísing, fylgir reglum og lógum í longri tíð



# Hjúnalag

- Ymiskt, hvussu brúdleypssiðirnir eru
- Hjúnalagið er avtala ml. kvinnu og mann
- Vígslan fer fram undir einari baldakin (hásætishimmal), sum ímyndar framtíðar heim teirra
- Vanliga fer vígslan fram í sýnagoguni, men kann eisini fara fram uttandura
- Rabbinari skipar fyri vígsluni
- Tey drekka eitt og sama glas av víni, sum er vælsignað av rabbinaranum
- Hátíðarhaldið endar við at brúðgómurin traðkar á eitt glas, so tað brotnar (ímyndar templið, sum verður lagt í oyði)





# Deyði

- Tá ein jødi doyr, savnast tey nærmastu og syrgja
- Jarðarferðin skal vera skjótast gjørligt eftir andlátið
- Einføld jarðarferð, tí rík og fátøk skulu fáa somu viðferð
- Øll eru eins fyri Gudi
- Allar gravirnar líkjast
- Ofta kasta tey nærmastu fyrstu spakarnar av jørð á grøvina
- Tey nærmastu halda seg við hús í sjey dagar eftir jarðarferðina









# Útbreiðsla

- Nógvir jødar, sum vóru riknir úr Ísrael ella tiknir til fanga, komu ongantíð heim aftur
- Teir hava tó hildið fast í trúnni
- Nógvir sett búgv við Miðjarðarhavið



# Samandráttur

- Tanak er Bíblia jødanna
- Jødar trúgva á ein Gud og tilbiðja hann
- Dávids sálmar eru sálmabókin hjá jødum
- Sýnagogan er gudshúsið hjá jødum
- Mósebøkurnar eru savnaðar í Toraini

# Spurningar

- 1) Nær er sabbatin?
- 2) Hvat er Kosher?
- 3) Hvat er Bar Mitzva og Bat Mitzva?
- 4) Hvat er Chanukah?
- 5) Hvat er Purim?
- 6) Hvar er Vesturmúrin ella Grátimúrurin?
- 7) Greið frá sáttmálanum ímillum Gud og jødiska fólkið
- 8) Greið frá muninum ímillum ortodoksar og reformertar jødar
- 9) Samanber tínar siðir við teir hjá jødunum